# Danskir frisørar vístu nýggjasta hármótan



*Alexander og Lars „in action“ á Parnassinum. Myndir Álvur*

Seinasta vikuskiftið vitjaðu tveir kendi danskir frisørar í Føroyum. Saman við Hárfríðkannarfelagnum skipaðu teir fyri skeiði á Hotel Hafnia. Á skeiðnum vórðu umleið 60 frisørar úr øllum landinum. Har fingu teir at síggja nýggjasta hármótan. Alexander og Lars arbeiða á eini hárfríðkannarstovu í Århus. Teir eru rættuliga kendir í hesum yrkinum og skipa javnan fyri skeiðum ymsa staðni í verðini. Herfyri vóru teir í Milano og løgdu frisørum har lag á.

Alexander sigur, at teir á skeiðnum í Havn í vikuskiftinum royndu at vísa føroysku frisørunum tann hármótan, sum er mest frammi í løtuni. Hesin hármótin er nógv inspireraður av tíðini miðskeiðis í 80-unum við dominerandi litum, hørðum linjum og góðum kontrastum og er talan um langt hár, so við undirtónum fyri at vísa linjurnar, ið liggja í tí langa hárinum.

Sjálvur heldur Alexander, at frisøryrkið er eitt sera spennandi arbeiði við óteljandi avbjóðingum. Tú kanst ongantíð læra nóg nógv. Og teir frisørar, sum vilja fylgja við hármóta og mótanum annars eiga ikki at halda seg aftur at fara á skeið. Tí vónar hann eisini, at skeið sum hetta, kann koma væl við hjá føroyskum frisørum og harvið hjá brúkarunum her.

Hvat viðvíkur yrkinum annars, so heldur hann, at tað er í stórari menning. Meðan bert fáir menn vóru til frisør fyrr, so er hetta nú heilt broytt. Nú umboða menninir nærum helvtina av øllum frisørvitjanum. Hetta er fyrstu ferð Alexander vitjar í Føroyum, og tað undrar hann ikki sørt, at so fáir menn arbeiða sum frisørar.

-Eg kann annars siga um teir føroysku frisørarnar, sum vóru á skeiðnum, at tær hava sera vakurt hár og klæða seg væl. Føroyar eru eitt vakurt land, men her er sera grátt, og tí er tað so hugaligt við so farvuríkum og glaðum fólki sigur danski frisørurin og sipar til tær umleið 60 hárfríðkannarkvinnurnar, sum vórðu við á skeiðnum á Hafnia.

**jan**





*Donsku frisørarnir Lars og Alexander saman við Tótu Sørensen, forkvinnu í Hárfríðkannarfelagnum og Ásu Perdomo, kassameistara. Mynd jan*



*Nøkur av hepnu modellunum á Hafnia seinasta leygardag. Mynd álvur*




Í býin Í býin Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Hóskvøldið spæla
IVORY PÁLLSDÓTTIR KVARTETT
Fríggja- og leygarkvøldið spælir
ÓLAVUR ØSTER BAND
Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

HAVNAR KLUBBI
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spæla
Moonshot

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.$^{00}$ – 23.$^{30}$
Fríggjadag kl. 17.$^{00}$ – 03.$^{30}$
Leygardag kl. 19.$^{00}$ – 03.$^{30}$
Sunnudag kl. 17.$^{00}$ – 23.$^{30}$

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

fk Matseðilin
Hósdagin 25. mai:
Stokt flest í persillusós
Fríggjadagin 26. mai:
Entrecote
Leygardagin 27. mai:
Rivjasteik
Mánadagin 29. mai:
Gjørd hara
Týsdagin 30. mai:
Fiskafrikadellir
Mikudagin 31. mai:
Karbonadir
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík



Vilja tygum vi› í
**Í b‡in** - hvønn hósdag
Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur



Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin



STØÐUGT FLEIRI HALDA Sosialin
WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.